

# Samkomublaðið fyri aug./sept. 2017

KELDAN

Okkara visión er, at Keldan skal vera ein andaligur miðdepil fyri allar Føroyar








www.keldan.fo

Samkomuleiðarapar: Pauli & Jastrid Høj. Tlf. 232511 & 232510

# Orðið

## Signing fylgir við trúfesti



Anna Randi Jacobsen

Í 1. Mós. 6 lesa vit um ein vælkendan mann, sum eitur Nóa. Hesin maður fekk eina serliga uppgávu frá Gudi. Hann var lýðin, og gav tað stóra signing við sær.

Tá vit keypa ein bil ella eini hús, taka flest fólk eitt lán og skriva tí undir ein sáttmála. Tá tað er gjørt,
og vit hava fingið lykilin í hondina, kenna vit eina gleði innan í okkum. Nú er hetta mítt.
Tá vit hava gjørt ein slíkan sáttmála, inniber hetta, at vit skulu gjalda aftur til bankan.
Hvussu gongur hjá okkum við tí, eru vit trúføst og gjalda til tíðina?
Gera vit alt, vit kunnu, fyri at klára hesi tingini?

Vit undirskriva eisini ein sáttmála, tá vit giftast. Tað er ein sáttmáli gjørdur fyri Gudi og fyri monnum.
Við hjúnabandssáttmálanum skulu vit ikki gjalda pening til ein banka, men vit skulu læra hvønn annan at kenna og finna út av hvørjum øðrum. Vit skulu hava tolmóð. Ofta er betri at tiga enn siga. Vit mugu brúka tíð saman.

Ein bilur, eini hús og eitt hjúnaband mugu haldast við líka. Tey skulu røkjast.
Um vit gera tað besta, vit kunnu, fyri at gera og yvirhalda okkara part av avtaluni/sáttmálanum, so blíva vit vælsignað longri frammi. Vit síggja tað ikki beinanvegin, men framman fyri okkum er signingin.

Vit mugu til tíðir kempa fyri at fáa tingini at ganga, og soleiðis var eisini hjá Nóa. Hann var lýðin og gjørdi akkurát, sum Gud hevði sagt við hann.
Hann fór niðan í fjøllini at smíða. Hann mátti finna tilfarið og fáa tað gjørt til, so mátini passaðu og mangt annað, sum skuldi til fyri at útføra uppgávuna. Hann gjørdi alt við eini kærleikshond. Hann mátti vera nærlagdur við øllum. Tað var umráðandi, at alt bleiv gjørt eftir boðunum, hann hevði fingið.

Tá henda uppgávan var komin at enda, og Nóa við húski komu út aftur og ofraðu til Gud, tá gjørdi Gud ein sáttmála við Nóa. Tekinið um sáttmálan er alabogin, sum bleiv settur á himmalin, og sum vit síggja við hvørt. Ein sáttmáli, sum kemur at varða til allar tíðir, so leingi sum menniskju eru á jørðini. Gud loypur ella rennur ikki burtur frá tí, Hann hevur sagt.

Vit njóta øll gott av tí, at Nóa var lýðin. At hann yvirhelt allar gjaldingar til tíðina ella gekk upp í at halda hjúnasáttmálan.
So latið okkum, sum kenna Jesus, halda okkum til sáttmálan - lesa Orðið, biðja og søkja Gud, okkara Faðir og ikki renna burtur frá tí, vit hava lovað ella bundið okkum til. Í sínum tíma gevur Gud vøkstur og signing sína, og nógv onnur kunnu njóta gott av somu signingum.

1. Mós. 9,8-17.

# Skrá fyri aug./sept.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 21. aug. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 22. aug. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| | | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Mikudagur | 23. aug. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Hósdagur | 24. aug. | kl.10.30-13.00: | Mammucafé |
| | | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Fríggjadagur | 25. aug. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Leygardagur | 26. aug. | kl. 20.00: | Heima AWAKE |
| Sunnudagur | 27. aug. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Búgva Olsen. Breyðbróting |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 28. aug. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 29. aug. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 2. sept. | kl. 20.00: | AWAKE XL við Búgva Olsen |
| Sunnudagur | 3. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Ólavi Jacobsen<br>Innsavnan av tíggjund og heiløgum gávum |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 4. sept. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 5. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 7. sept. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 9. sept. | kl. 20.00: | AWAKE við Anju og Øyvind.<br>Evni: Sex og relatiónir. |
| Sunnudagur | 10. sept. | kl. 11.00: | Sjónvarpsmøti við Paula Høj |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 11. sept. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 12. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Leygardagur | 16. sept. | kl. 20.00: | AWAKE "Frá hjarta til hjarta" |
| Sunnudagur | 17. sept. | kl. 11.00: | Morgunmøti við Anniku og Jastrid |

| | | | |
|---|---|---|---|
| Mánadagur | 18. sept. | kl. 17.00: | Bønarmøti |
| Týsdagur | 19. sept. | kl. 10.00: | Bønardagur |
| Hósdagur | 21. sept. | kl. 10.30-13.00: | Mammukafé |
| Leygardagur | 23. sept. | kl. 20.00: | AWAKE við Ólavi Jacobsen |
| Sunnudagur | 24. sept. | kl. 11.00: | Missiónsmøti við Búgva Olsen |

# Lýsingar

**Sjónvarpsmøti**

Sjónvarpsmøti verður hin 10. september kl. 11.00. Við hesum møti fáa vit  møguleikan at røkka út til okkara land. Tí verður heitt á alla samkomuna um at møta væl upp. Tað er eisini ein góður vitnisburður úteftir. Vit biðja eyka nógv fyri hesum møti

**Bønarvika 21-25 august**

Frá 21-25 august hava vit bønarviku í Kelduni, har vit koma at biðja hvønn gerandisdag kl. 17.00-18.00 í lítla sali. Leiðslan hevur kent gjøgnum summarið, at vit sum samkoma skulu fokusera enn meiri á bøn nú eftir summarsteðgin, og vit byrja við eini bønarviku, har vit koma saman og biðja fyri øllum tí, sum liggur fyri framman, fyrst og fremst tí, sum rørir seg í samkomuni, men eisini fyri okkara landi og fólki. Ják 5:16b sigur:“ Bøn, biðin av rættvísum manni, avrikar nógv, táið hon verður biðin við kraft.” Vit trúgva, at bøn ger mun og hevur stóra ávirkan á okkara umstøður. Tí hevði tað verið gleðiligt, um vit saman høvdu kunnað lyft bønarandan í samkomuni bæði í bønarvikuni og eisini, tá tað kemur til tey regluligu bønarmøtini, ið eru mánadag kl. 17.00-18.00, hetta hálvárið.

## Gáva til samkomuna og samkomuvirksemið

Tíggjund/gáva til Kelduna kann flytast á kontu: 9181-1205066 og 6460-1568592
Gáva til missión kann flytast á kontu: 9181-1231369 og 6460-1568606
Gáva til útbygging kann flytast á kontu: 9181-7074346 og 6460-1568584